





# IKKI ØLL SPØL ERU FYRI BØRN

Alsamt fleiri vaksin spæla telduspøl, og telduspælarin er í miðal um 30 ára aldur. Tí verða gjørd nøkur spøl, sum bara eru fyri vaksin. Umráðandi er tí, at vit kanna spølini, ið vit keypa børnunum.

Síðan 2003 hava aldursmerkir á eskjunum hjá spælarunum leiðbeint um, hvørt eitt spæl kann tykjast ræðandi hjá summum aldursbólkum. Aldursmerkini eru vegleiðandi og Miðlaráðið mælir øllum til at ganga eftir merkjunum.

Spælvinnan arbeiðir miðvíst við at hevja og styðja aldursmerkini. Seinast eru merkini savnað í tey nýggju spælkonsollini Xbox 360, Nintendo Wii, PLAYSTATION 3 og PSP, so at foreldur fáa avmarkað atgongdina til eitt nú 18+ spøl.

Royn tey góðu ráðini um børn, ung og telduspøl, ið nevnd eru her í faldaranum og les meiri á www.miðlarad.fo og www.spilpolitik.dk. Lesið meiri um aldursmerking á www.pegi.info

@*!

# GÓÐ RÁÐ UM TELDUSPØL

**VER VIÐ**
Ver við í spælverðini hjá barninum. Tosa um tað, barnið upplivir í telduspælinum. Hjálp barninum at vera realistiskt við atliti at tí, tað sær og hoyrir. Spæl saman við barninum, tá ið tað ber til.

**LÆR AV BARNINUM**
Við telduna eru tað yvirhøvur børnini, ið eru tey serkønu. Tú kanst eisini læra av barninum, sum veit nógv frá javnaldrum og úr skúlanum.

**GER AVTALUR**
Avtala við barnið hvussu nógv, ið spælast kann. Fá spælsteðg í lag ein tíma fyri songartíð ella spælfrí hugnakvøld fyri alt húskið.

**HAV TELDUNA FRAMMI**
Lat telduna ella spælikonsollið standa í køkinum, alrúmi ella stovuni. So ber tær betur til at vera við í áhugamálunum hjá barninum, og tú veitst, hvat ið spælt verður.

**SKIPA FYRI ØÐRUM VIRKSEMI**
Tað er gott at halda frið viðhvørt. Spæla børn í nógvar tímar, hava tey brúk fyri at røra seg. Børn, ið keða seg uttan telduspæl, hava brúk fyri øðrum líka so spennandi virksemi í síni frítíð.

**KENN SPØLINI**
Kanna aldursmerkingar og set mark fyri, hvat slag av spølum, tú heldur, at barnið sleppur at spæla. Ráðfør teg við onnur, ið vita um spøl, og minst til, at piratkopi eru ikki aldursmerkt.

**TOSA VIÐ ONNUR FORELDUR**
Tosa við onnur foreldur um teirra støðu til og reglur fyri telduspøl. Tosa um spælivanar og spælatburð.

**VÍS TEG SUM FYRIMYND**
Hóast tú ikki spælir, kanst tú saktans vera fyrimynd. Sig hvat tú heldur um spøl og tosa við barnið um tað.

© ISFE, MUF og Miðlaráðið – til verju fyri børn og ung 2009

16+



PEGI ONLINE



# KANNA ALDURSMERKINI Á TELDUSPØLUM

GÓÐ RÁÐ UM BØRN, UNG OG TELDUSPØL





MIÐLARÁÐIÐ

ISFE

MUF MULTIMEDIEFORENINGEN

insafe



@*!

**3+**

Spælið verður mett at vera meinaleyst, men tað kann saktans vera ov torført hjá smáum børnum.

**7+**

Spælið kann ræða smærri børn.

**12+**

Í spælinum kunnu vera eiðir og ódetaljeraður harðskapur.

**16+**

Í spælinum kunnu vera blóðigir tilburðir.

**18+**

Spælið vísir t.d. realistiskan harðskap móti verjuleysum fólkum og djórum.

Sum vera man eiga vit at vera sera ansin við spølum merkt 18+.



# ALDURSMERKIR

## VÍSA IKKI, HVUSSU TORFØRT SPÆLIÐ ER – MEN UM TAÐ KANN TYKJAST RÆÐANDI

Øll nýggj teldu- og konsollspøl eru merkt við Pan European Game Information (PEGI). Aldursmerkini 3+, 7+, 12+, 16+ og 18+ vísa, um tað eru leikbrot í spælinum, ið kunnu ræða børn og ung. Aldursmerkini snúgva seg IKKI um torleikastigið í spælinum. T.d. er eitt 3+ spæl meinaleyst, men tað kann vera torført hjá einum 3 ára gomlum barni. Eitt 3+ spæl er altso ikki neyðturviliga eitt spæl, ið smábørn fara at fegnast um.




The Simpsons Game er eitt dømi um eitt spæl, ið er merkt eftir PEGI skipanini. Aldursmerkið 12+ stendur frammanfyri á spælinum. Aftanfyri á spælinum vísa ímyndirnar, at harðligir tilburðir, eiðir og nekt/sex eru í spælinum.

**RÚSEVNI**
Spælið vísir til ella vísir rúsevnisnýtslu.

**MISMUNUR**
Í spælinum eru tilburðir, ið kunnu verða hildnir at gera mismun.

**HARÐSKAPUR**
Í spælinum eru harðligir tilburðir.

**SÆRANDI MÁLBERING**
Í spælinum er særandi málbering.

**RÆÐANDI LEIKBROT**
Spælið kann ræða smærri børn.

**SEX OG NEKT**
Spælið vísir nekt og/ella vísir til sex.

**PENGASPÆL**
Spælið eggjar til ella undirvísir í pengaspæli.

**PEGI ONLINE**
Búmerkið vísir, um spælið kann verða spælt online. Samstundis vísir tað, at spælframleiðarin og operatørur hevur bundið seg við nøkrum grundleggjandi leiðreglum í sambandi við at verja børn og ungar spælarar.

PEGI Online búmerkið er á pakkanum/spælinum, um tað verður selt á cd/dvd, annars verður tað víst á sjálvum webstaðnum.

# INNIHALDSÍMYNDIR

## GREIÐA FRÁ, UM HARÐSKAPUR, RÆÐANDI LEIKMYNDIR, EIÐIR, SEX O.A. ERU Í SPÆLINUM

Aftanfyri á spæleskjunum verður aldursmerkið hjá spælarunum lýst gjøllari við einari ella fleiri av ímyndunum omanfyri. Tey lýsa, at eitt spæl t.d. er merkt 16+ fyri harðskapsinnihald, særandi málbering ella nekt. Spøl, ið eru merkt 3+ hava onga innihaldsímynd aftanfyri. Kanna merkingina hjá spælarunum á www.pegi.info